# Svartkjaftakanningar sunnanfyri

**Jákup Sverri, túrur nr. 2412**

**Tíðarskeið: 20/3-5/4 2024**

**Ábyrgd:** Jan Arge Jacobsen



**Endamál:** *At kanna nøgdirnar av svartkjafti í økinum sunnan fyri Føroyar og í norðara parti av gýtingarøkinum. Ekkókanningin er partur av felags kanningunum av svartkjafti, skipaðar undir ICES saman við Noregi og ES (Hollandi, Írlandi og Spania).*

---


## Samandráttur

Ekkókanningar av svartkjafti sunnan fyri Føroyar og suður í bretskan og írskan sjógv vóru gjørdar í tíðarskeiðinum 20. mars til 5. apríl 2024. Mynd 1 vísir siglingarleiðina og nøgd av svartkjafti skrásett við ekkóloddi. Gevi gætur, at føroyska kanningin er partur av eini felagskanning, har hini rannsóknarskipini sigldu kósir millum okkara strikur, og tí kann ikki sigast nakað um samlaðu nøgdina enn. Vit sóu nógvan svartkjaft á leiðini fram við írsku og skotsku hellingini (Mynd 1). Talan er serliga um 2020 árgangin, men eisini 2021 og 2019 árgangirnar (Mynd 2). Meginparturin av fiskinum hevði gýtt. Longdarbýti og aldursbýti av svartkjafti er víst í Mynd 2. Miðallongdin var gott 25 cm og miðalvektin um 100 g í okkara prøvum í ár.





*Mynd 1. Akustiskar skrásetingar av svartkjafti ($s_A$, $m^2/nm^2$) sunnan fyri Føroyar 20/3-5/4 2024. Nøgdin er víst sum sirklar, har støddin á sirklinum vísir, hvussu nógv av svartkjafti stóð undir skipinum. 200 og 500 m botnlinjur eru vístar.*







*Mynd 2. Longdarbýti (vinstrumegin) og aldursbýti (høgrumegin) av svartkjafti frá kanningunum 20/3-3/4 2024.*

## Um túrin

Túrurin byrjaði við at kalibrera (stilla) ekkóloddini inni á Skálafjørðinum. Síðani var farið suður í írskan sjógv, har túrurin skuldi byrja. Veðrið var vánaligt meginpartin av túrinum, kanska tríggir dagar við hampiligum veðri. Fyri tað mesta liggjandi landnyrðingur, og hetta tarnaði okkum nakað í tíð. Tilsamans 27 støðir vórðu tiknar, har hiti, salt og æti bleiv mátað. Tóvað varð eftir svartkjafti, tá hann sást á ekkóloddinum.

Endaligu úrslitini frá felags kanningunum verða tøkar, tá tølini frá øllum luttakandi skipunum verða viðgjørd seinni í apríl.

## Prøvatøka

Veiðan varð viðgjørd sambært Sýnishondbókini. Umframt longd og vekt av svartkjafti vóru nytrur av pørtum av veiðuni tiknar til aldursgreining.

## Reiðskapur

Multpelt 832 flótitrol og 4.5 $m^2$ Twister lemmar. CTD og WP2-glúpur.

## Viðmerkingar

Kanningin er skipað sum ein altjóða felags kanning undir ICES, har Føroyar luttaka saman við Noregi, Írlandi, Hollandi og Spania. Samlaða nøgdin av svartkjafti frá øllum skipunum verður roknað síðst í apríl.

## Fólk við frá Havstovuni

Jan Arge Jacobsen (kanningarleiðari)
Leon Smith, Jens Arni Thomassen, Durita Sørensen